## Færri feit

Í tjúgu ár hava heilsumyndugleikarnir í Norðurjyllandi skipað fyri einum átaki, hvørs miðvísa endamál var at tálma tí altsamt veksandi trupulleikanum við fiti ella rættari sagt ovurfiti. Nú vísa tey seinastu tølini, at átakið hevur borið frukt. Í 1987 vóru 11 prosent av fólkinum í Norðurjyllandi ov feit. Støðan er tann sama í dag, og tað er eitt gott úrslit, tí aðrastaðni er talið á teimum feitu ella ov feitu tvífaldað í sama tíðarskeiði, sigur danska útvarpið.

## Fólkafundur á Heygnum við Samljóð í Skopun 2. hvítusunnudag

Sandoyar Fólkafloksfelag skipar fyri fólkfundi í Skopun. Ætlanin er at varðveita fólkafundirnar sum teir vóru, við at hava fund á hvørjum ári í Sandoynni. Fundurin verður hildin á Heygnum við Samljóð í Skopun, og um ikki viðrar verður fundurin inni í Samljóð. Nærri verður at frætta um fundin seinni, sigur Sandoyar Fólkafloksfelag.

Útoyggj 2007:

# Liðugt við oljutunnum



*Nógv fólk av útoyggj var á stevnuni hjá Útoyggjafelagnum í dag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Nú skal skil fáast á oljuflutninginum til útoyggjarnar, sigur Jacob Vestergaard, innlendismálaráðharri**

ÚTOYGGJAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hetta kom fram, tá landsstýrismaðurin fyrrapartin setti stevnuna "Mín oyggj - mín framtíð" sum Útoyggjafelagið skipar fyri.

Í ár eru játtaðar 750.000 kr. sum stuðul til ymiskar ætlanir á útoyggj, og av hesum fara tveir triðingar til at fáa skipaðan oljuflutning.

Ætlanin er nevniliga at fáa í lag eina skipan har sleppast kann undan oljutunnunum.

- Henda ætlanin er komin undir land. Vit ætla fyrsta dagin at kalla inn til fund um virksemið hjá kommununum í hesi verkætlanini, sigur landsstýrismaðurin.

Arbeitt verður eisini við at fáa nýggj strandfaraskip ístaðin fyri tey gomlu, sum hava høgan aldur ídag. Í hesum sambandi er ikki óhugsandi at farmaflutningurin og flutningurin av ferðafólkunum verður skildur sundur.

Hetta kann verða gjørt við at ein fær skjóttgangandi før til ferðafólkini, meðan farmurin verður fluttur við øðrum báti sum er serliga egnaður til júst tað.

Í síðsta enda verður eisini arbeitt við at økja um títtleikan av fráferðunum hjá standfaraskipunum.

### Lív lagað

Stevnan hjá Útoyggjafelagnum er skipað fyri við tí fyri eyga at vísa á, at fáa útoyggjarnar betri umstøður, er teimum lív lagað.

Byrjað varð við framløgum, har umboð fyri tær átta útoyggjarnar greiddu frá umstøðunum og framtíðini á teirra staði. Her vóru umboð fyri Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hest, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Her fekst týðiligt prógv um, at fólkini á útoyggj hava ikki mist vónina um lív og framtíð. Nógv góð hugskot vórðu løgd fram, við tilboðum bæði til børn, ung og gomul og ikki minst til ferðavinnuna, ið vindur alt meiri og meiri uppá seg her á land.

Poulina Eliasen av Syðradali vísti m.a. á, hvussu stóran týdning gott og regluligt ferðasamband hevur fyri menningina av eini oyggj.

- Tað er altavgerandi við góðum ferðasambandi. Hetta hava vit í Kalsoynni upplivað og sæð. Tí er ynski mítt at politikkarnir geva hinum oyggjunum somu umstøður.

- Men hinvegin, ein skal eisini liva, og tí mugu politikkararnir ikki gloyma tað, segði hon m.a. í síni framløgu.

## Frítíðardepil í Mikladali

Ein spennandi ætlan varð løgd fram á stevnuni hjá Útoyggjafelagnum í morgun - at gera ein frítíðardepil við smáttum og øðrum tilhoyri í Mikladali.
Tað var Eyðun Eliasen sum legði hesa ætlan sína fram. Sambært henni ætlar hann at byggja smáttur, spæliplláss, campingpláss, sølubúðir og annað á einum 20.000 fermetra stórum øki, hann sjálvur eigur í bygdini.
- Her kundi verið skeiðvirksemi og møguleikar fyri útferðum gjørdar fyri føroyingar og útlendingar.
- Smápássini eru meiri verd enn hvat vit geva okkum far um. Ferðafólk ynskja fleiri tilboð, og her verður so møguleiki fyri einum slíkum, sigur Eyðun Eliasen.